tíðindablaðið
sosialurin

55. árg. ★ kr. 4,-

Nr. 101 ★ hósdagur 7. oktober 1982

frælsi *javnaður* *brøðralag*

Nú skula Havnarmenn fáa bank!

Havnarmenn skulu fáa av at vita fríggjakvøldið, siga býráðslimir í Klaksvík uttan at rodna.

Alt tos fyrr í summar um ársins dystir fánar burtur í onki, tá væl mannaðu liðini hjá Klaksvíkar býráð og Tórshavnar býráð stilla upp á fótbóltsvøllinum í Klaksvík í annaðkvøld klokkan sjey.

Nú skal tað vera, siga teir har norðuri. Býráðini hava tvær ferðir fyrr dystast um bóltin. Fyrst í Havn. Tá endaði 1—1. Og returdystin taptu klaksvíkingar 1—3. Í Klaksvík!!!

Vit hava fingið liðið hjá klaksvíkingum. Tað er sterkt. Á pappírinum í hvussu so er: Jógvan við Keldu, Asbjørn Lómaklett, Olvheðin Jacobsen, Jógvan Isaksen, Esmund Jacobsen, Karl Hansen, Kristian F. Olsen, Álvur Zachariasen, Andras Joensen, Vilhelm Johannesen, Christian Olsen, Jógvan Clementsen, Mikkjal á Bergi, Ólavur Thomsen og Knút Olsen.

Hesir skula umboða høvuðsstaðin:

Poul Michelsen, Essa Arge, Arnstein Niclasen, Leivur Johannesen, Ronald Poulsen, Heðin Mortensen, Ingi Mohr, Jóhann Mortensen, Søren Pram Sørensen, Børge B. Hansen, Tummas J. Midjord, Kjartan Kristiansen og Sverri Trónd Hansen.

Eisini eitt rimmar lið. Á pappírinum.

Fótbóltsdysturin, onkur er so óreinur at kalla hann skemtidyst, er til frama fyri Blindafelagið.

hd

Taka lán til útstykking

Býráðið í Klaksvík hevur samtykt at taka lán, 1,2 mill. kr., til vegargerð í samband við útstykking í Árnafirði.

Útstykkingarprojektið var klárt í fjør heyst. Tað umfatar 20 grundstykki. Harav fer kommunan nú at gera átta byggibúgvin.

Arbeiðið at gera vegin og byggibúningina verður boðið út nú í heyst.

Kommunan hevur umsóknir um grundstykki í Árnafirði. Tann elsta er væl yvir 20 ára gomul.

Ongin fiskikapping

Fiskikappingin hjá Lions Club í Klaksvík verður helst av ongum í ár. Hon bleiv avlýst vegna veður og síðani er ymiskt annað komið í vegin, harður streymur, konfirmatiónir og fjallið til dømis.

Fiskikappingardansurin bleiv kortini hildin, tá hann skuldi. Hann gav umleið 8.000 kr. í netto.

hd

Óvist enn hvussu sparingin hjá Schlüter rakar í Føroyum

Úti í Tinganesi vita tey ikki enn, hvørjar avleiðingar stóru spariætlaninar hjá Schlüter-stjórnini fáa fyri Føroyar, verða tær samtyktar í Fólkatinginum.

Johan Djurhuus, skrivstovustjóri í Landsstýrinum, sigur, at enn hevur Landsstýrið onki frætt niðrifrá.

Tað er tó greitt, at onkursvegna koma spariltøkini at raka í Føroyum eisini. Til dømis er ætlanin, at fólk, sum arbeiða hjá tí almenna, skulu ikki fáa løn fyri fyrsta dagin, tey eru sjúk. Góðtekur Fólkatingið hetta, kemur tað eisini at raka tey, sum arbeiða á statsstovnum í Føroyum, hjá til dømis politivaldinum, dómsvaldinum og deildunum á Eirargarði.

Týsdagin í næstu viku fara umboð fyri Løgtingið og Landsstýrið á fund við ríkisstjórnina. Á skránni fyri hendan fundin er tó bert spurningurin um undirgrundina, sigur Johan Djurhuus. Hann sigur, at seinni í heyst verður aftur fundur við ríkisstjórnina. Tá koma onnur mál, eitt nú statsstudningurin til havnabyggingar, til viðgerðar.

Á fundinum nú týsdagin luttaka Jógvan Sundstein, Hilmar Kass, Pauli Ellefsen og Johan Djurhuus fyri Føroyar.

hd



Stjórnin ætlar, at tey sum arbeiða hjá statinum, sjálvi skula gjalda fyrsta sjúkradag. Politigarðurin í Havn er eitt av arbeiðsplássunum hjá statinum í Føroyum

Føroyskir roykjarar í Sweitz

Í hesum døgum eru tveir føroyskir fiskaroykjarar í Sweits í ørindum. Tað er Julius Johannesen frá Klaksvíkar Roykivirki og Svend Fuglø frá roykivirkinum Samm-fisk í Havn.

Í Sweits skulu teir kanna, hvussu marknaðurin har ynskir eitt nú føroyskan laks, tungu og svartkalva roykt.

Herfyri var ein umboðsmaður fyri eina stóra sveisiska fyritøku í Føroyum og vitjaði føroysku roykivirkini umframt Føroya Fiskasølu. Hann er sera áhugaður fyri at keypa m.a. royktan laks úr Føroyum. Henda fyritøkan innflytir árliga umleið 400 tons av royktum laksi.

Robert Poulsen, stjóri á Fiskasøluni sigur, at roykivinnan er helst komin fyri at vera. Hann heldur, at her liggja góðir møguleikar, men tað hevur nógv at siga, at vit í størri mun læra at roykja vøruna júst soleiðis, sum kundin ynskir hana.

Tað at roykja fisk er eitt rættiliga krevjandi handverk og arbeiði. Higartil hava føroyingar roykt hýsu og nakað av øðrum fiski. Tað hevur tikið fleiri ár at finna fram til tað heilt røttu roykingina av hýsini, sum er farin til Bretlands. Nú eftirspurningurin eftir royktum laksi fer at vaksa er neyðugt at vita, hvussu keyparin ynskir laksin royktan.

Fiskasølan trýr uppá royking av fiski sum ein nýggj vinna í Føroyum. Í hesum sambandi hevur Fiskasølan fingið samband við ein royndan danskan roykjara. Hann hevur arbeitt í roykiyrkinum í meira enn 15 ár, og kemur til Føroya í næstum. Hann skal so arbeiða á Samm-fisk og á roykivirkinum í Klaksvík í eina tíð!

jan.

Føroyski upsin í vanda

— Vánalig vøra funnin á goymslu í Hirtshals

Útflutningurin av føroyskum upsablokki er í trupulleikum í løtuni. Hetta kemst m.a. av tí stóra útboðnum. Bæði norðmenn og týskarar veiða nógvan upsa í løtuni.

Men haraftrat kemur, at góðskan á føroyska upsanum, sum er veiddur í summar og er frystur til upsablokk, er ikki tann besta.

Í hesum døgum hava menn uppdagað vánaligan fisk í einum »partii« av upsablokki á eini goymslu á Nýfrost í Hirtshals. Tað er enn óvist, hvussu nógv av hesum partiinum er vána vøra, men í løtuni verður hetta kannað.

Vit útflyta rættiliga nógvan upsablokk til Vesturtýsklands, og nú útboðið á marknaðinum er so stórt, verða tað sett stór krøv til góðskuna. Tí kemur tað ógvuliga illa við nú, at góðskan á føroyska upsanum ikki er í lagi.

Robert Poulsen, stjóri á Fiskasøluni sigur, at málið er rættiliga álvarsamt, og at teir kanna tað í løtuni. Hann sigur, at talan er um fisk, sum er veiddur í summar og avreiddur til fleiri flakavirki kring landið. Summarfiskurin hevur lyndi at vera ov bleytur og er tí sera viðbrekin at fáast við.

Nú er so spurningurin, hvørjum liði í framleiðsluni vána góðskan stavar frá. Her eru fleiri møguleikar. Eitt nú at fiskurin er ov ringur at arbeiða, tí hann er ov bleytur, at hann er ikki nógv væl blóðgaður umborð og ikki nóg væl útbløddur ella at hann á landi er ikki arbeiddur nóg væl. Eisini kann tað koma fyri, at fiskurin hevur ikki ligið nóg væl á goymslu. Hesum seinasta vil Robert Poulsen vera við ikki er orsøkin.

Sjálvur heldur hann, at góðskueftirlitið helst eigur at vera enn strangari. Uttan iva krevst betri stýring við veiðu og framleiðslu, skulu vit fáa eina góðsku, sum gevur ein góðan prís á marknaðinum.

Ein spurningur, sum onkuntíð hevur verið frammi í hesum tjakinum, er, um nú flakavirkini keypa rætt inn: at tey av ótta fyri at missa bátarnar skráseta fiskin sum A-fisk, tá hann kanska í veruleikanum er B-fiskur ella verri slag.

Robert Poulsen heldur, at vit mugu hava meiri stýring við sjálvari handteringini av fiskinum bæði á sjógvi og á landi.

Tað hava annars verið trupulleikar við upsanum fyrr eisini. Bæði í januar og í mai vóru trupulleikar við góðskuni. — Tað sýnist sum at góðskueftirlitið virkar ikki nóg væl alt árið.

jan